# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# LANDIÐ SUM KAPPINGARNEYTI

Á vinnudegnum fríggjadagin varð spurt, um vit skulu blíva við at mala í ring. Spurningin setti Vinnuhúsið fyri at seta orð á kensluna um, at vit mala í ring.

Og nógv okkara hava hesa kensluna. Síðsta vika var í so máta eitt gott dømi, har avgerðir hjá nøkrum fáum førdu til, at milliardir fóru fyri skeyti - pengar hjá kapitalinum, men so sanniliga eisini pengar hjá Palleba og Marsannu. Og hava vit malið í ring? Vit kunnu hóskandi svara við at spyrja, um vit hava lært nakað av 1992? Nóg nógv hava vit so ikki lært.

Um vikuskiftið fegnaðust vit um, at útvarpsstøð okkara fylti trý ár sum partur av Miðlahúsinum.

Tað var við bjørtum vónum, at Sosialurin fór undir at reka útvarpsvirksemi. Ætlanirnar vóru gamlar - men tá Rás2 var til sølu, so var tað nógv ómakasleysari at keypa eina verandi støð, heldur enn at byggja eina nýggja.

At vit tordu at taka hetta takið var eisini tí, at løgtingið púra greitt segði, at tann mismunur, sum Føroya Løgting og Føroya Landsstýri sýna privatu miðlunum í sambandi við lýsingar, skal burtur.

Kortini kunnu vit staðfesta, at størsta hóttanin móti privatum fjølmiðlavirksemi í Føroyum júst eru okkara fólkavaldu, sum ikki hava dirvi ella hegni til at fáa skipað viðurskiftið á fjølmiðlaøkinum.

Kringvarpið undirgrevur lýsingarmarknaðin við at selja lýsingar, samstundis sum stovnurin er ein skattainnkrevji. Við almennum stuðli kappast Kringvarp Føroya móti privatum fjølmiðlum, sum sjálvandi tapa í kappingini, tí vit hava ikki landskassan í rygginum.

Um vikuskiftið hava fólk frá Rás2 verið á stevnu fyri útvarpsstøðir í Danmark, har nógvar støðir hava tað trupult í hesum døgum. Men tá tey frætta um, hvussu støðan er í Føroyum, og at landsins stýri er størsta hóttanin móti privatum útvarpsstøðum, tá øtast tey. Tey spyrja, um politiski myndugleikin veruliga ynskir sær veikar fjølmiðlar.



Tað vóna vit sjálvandi ikki, hóast okkara politikarar so væl og virðiliga liva upp til yvirskriftina hjá Vinnuhúsinum um at mala í ring.

Vit ynskja okkum frælsi at reka frítt fjølmiðlavirksemi, sum ikki skal verða darvað av politiskari uppíblandan, og vit halda eisini, at landið hevur fortjent at frítt alment kringvarp, óheft av vinnuligum áhugamálum. Tað hava vit ikki.

Public Service sáttmálin eigur at koma upp á pláss nú. Um ikki Kringvarpið sleppur kappingini um lýsingarnar, so eiga aðrir miðlar at gerast partur av sáttmálanum og fáa part av kringvarpsskattinum.

**» Landið hóttir grundarlagið hjá privatu miðlunum**

## Droppar Bogi borgstjóran?

Herfyri kom fram, at Bogi Andreassen, varaborgarstjóri í Havn, er settur sum marknaðarleiðari og býlingsstjóri í SMS, har hann skal taka sær av ymsu tiltøkunum á torginum í SMS.

Bogi Andrassen hevur seinastu árini starvast hjá Tórshavnar Kommunu sum leiðari á ungdómshúsinum Margarinfabrikkini.

Eftir síðsta býráðsval, tá samgongan millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin varð endurskipað, søgdu teir báðir flokkarnir, at Tórshavnar kommunu framyvir skuldi hava tríggjar borgarstjórar í starvi. Tað vil siga, at Heðin Mortensen skuldi halda fram sum borgarstjóri, meðan tveir aðrir varaborgarstjóra eisini skuldu vera løntir í starvi.

Men Fíggjarmálaráðið segði nei. Togast hevur veirð aftur og fram um hetta, men lítið og einki hevur verið at frætt. Onkur vil vera við, at hetta bara var ein finta til tess at sissa Tjóðveldisflokkin í Tórshavnar býráð.

Tað lá í kortunum, at Bogi Andreassen í øllum førum var annar av hesum løntu varaborgarstjórunum.

Spurningurin er so, um hesar ætlanir eru sleptar endaliga...



## Slipsadreingirnir horvnir

Grannarnir fyri vestan kenna um nakar, hvat tað merkir, tá »fíggjarliga støðufesti« ridlar. Og tað eru ikki øll, sum eru so hørm um tað, sum hendi, tá Ísland varð sett í botnleysa skuld, bruttotjóðarúrtøkan skrambláði niður og arbeiðsloysi fór øvuta vegin.

Summi halda, at fíggjarliga kollapsið hjá Íslandi førdi til sjálvrannsakan. Ella sum ein ungur íslendingur segði:

- Áðrenn kreppuna var Reykjavík ein býur fullur av slipsadreingjum, og tað var ikki til at halda út. Nú eru teir burtur. Spyrt tú meg, so er kreppan tað besta, sum er hent okkum...

Íslendska ferðaráðið hevur roynt at relanserað íslandi sum ferðamál, og Lonely Planet hevur kosið Ísland til eitt av heimsins »Best Value Destinations« - kreppan hevur gjørt tað fyrr so dýra landið eitt sindur meira »affordable« - og eggjar lesarum til at taka av møguleikanum, meðan teir kunnu.





**» Ver nú sakligur Hermann**

JÓANNES EIDESGAARD
KJAK Á SÍÐU 10



**» Bjargið Fossá**

EYÐUN Á BORG
KJAK Á SÍÐU 31

## Helena liggur á public service

Tað eru ikki bara vit í Miðlahúsinum, sum bíða eftir Helenu Dam á Neystabø, sum enn ikki hevur gjørt ein Public Service sáttmála við Kringvarpið. Ein slíkur sáttmáli kann sjálvandi ikki innihalda loyvi til handilslýsingar.

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar í morgun kom tíðindaskriv frá Sjúrði Skaale, tingmanni, sum hevur sett landsstýriskvinnuni fyrispurning um júst hetta málið.

- Hvør er orsøkin til, at public service-sáttmálin millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið ikki er settur í gildi enn? Nær verður public service-sáttmálin millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið settur í gildi?



Soleiðis spyr Sjúrður Skaale. Hann vísir á, at tann 19. mars 2009 lovaði landsstýriskvinnan í mentamálum á almennum fundi, at eitt uppskot til public service-sáttmála millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið skuldi leggjast fyri tingið sama vár. Men tað hendi ikki.

- Tann 25. november 2009 kom eitt uppskot um sáttmála fyri tingið til aðalorðaskiftis. Breið semja var um, at slíkur sáttmáli eigur at verða settur í verk, og frá fleiri pørtum komu uppskot og tilmæli um ábøtur á uppskotið. Sáttmálin skuldi sambært landsstýriskvinnuni vera galdandi frá 1. januar 2010 til 31. desember 2013. Tað hendi heldur ikki, sigur Sjúrður Skaale.

Hann vísir á, at nú er 2010 farið at halla er framvegis eingin sáttmáli settur í verk.

- Og tað er ikki bara politiska skipanin, sum bíðar eftir hesum sáttmála. Tað gera starvsfólk í kringvarpinum eisini - og tað gera starvsfólk á privatu miðlunum eisini, vísir Sjúrður Skaale á.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*